# *Reglugerð*

*fyri hald av flogfenaði í bygdum øki í Vága kommunu*

Við heimild í §§ 26 og 32 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, við seinni broytingum, verður hendan reglugerð sett í gildi.

**§ 1.** Reglugerðin fevnir um uttandura hald av flogfenaði í Vága kommunu.

*Stk. 2.* Reglugerðin fevnir tó ikki um vinnuligt virksemi, ið hevur umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd.

*Stk. 3.* Flogfenaður eru høsn, gæs, dunnur, kalkunir, dúgvur og annar fuglur.

**§ 2.** Øll, ið fara undir at halda flogfenað, skulu gera tað í samsvari við hesa reglugerð.

*Stk. 2.* Tey, ið ætla at halda flogfenað, eiga at boða næstu grannum sínum frá, og kunnu spyrja seg fyri hjá kommununi um ivamál.

*Stk. 3.* Flogfenaðhald, ið longu eru, áðrenn reglugerðin kemur í gildi, kann halda fram sum er, men koma tó undir reglurnar í §§ 3-5.

**§ 3.** flogfenaður skal verða innigirdur. Búr, hús og tílíkt bygningskent tilhald hjá flogfenaði skal vera í minsta lagi 2,5 m frá marki til granna..

*Stk. 2.* Girðing skal antin vera púra tøtt, ella vera í minsta lagi 0,5 m frá marki til granna, tá talan er um hegn, rimagarð ella tílíkt.

*Stk. 3.* Girðingin skal gerast forsvarliga, eisini so at annar fuglur ikki fær flogið inn, og um neyðugt, skal net spennast yvir.

*Stk. 4.* Búr og hús skulu lyftast 0,35 m upp frá jørðildinum fyri at tryggja móti rottu. Tó ikki gásarhús, ið kunnu vera grivin niður í svørðin.

*Stk. 5.* Hanar mugu ikki vera uttandura millum kl. 21 á kvøldi og kl. 7 á morgni.

Hammershaimbsvegur 1 // FO 360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo

**§ 4.** Fóður skal goymast í rottutryggum íløtum.

*Stk. 2.* Gevast má ongantíð meiri enn tað, sum verður etið eftir í mesta lagi einum tíma. Avlop skal takast burtur í seinasta lagi ein tíma áðrenn sólin fer niður, tó í seinasta lagi kl. 20 á kvøldi.

*Stk. 3.* Búr, hús o.t. skulu regluliga sópast og haldast rein. Girðingar skula haldast í góðum standi.

*Stk. 4.* Tøð (skarn) frá húsdýrahaldinum skal antin brúkast sum tøð á egnum stykki ella latast til IRF.

**§ 5.** Um hald av flogfenaði elvir til ampa sum lukt, gang, nógva flugu, rottu ella annað, kann Vága kommuna sambært § 23, stk 2 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvissreglur geva boð um, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag. Verða boðini ikki fylgd, kann kommunan seta forboð fyri haldinum.

**§ 6.** Í serligum førum kann Vága kommuna, eftir umsókn, geva smærri frávik frá ásetingunum í §§ 3-4.

**§ 7.** Avgerðir hjá Vága kommunu eftir hesi reglugerð kunnu innan 4 vikur kærast til Umhvørvisstovuna. Kæra skal sendast til kommununa, sum sendur hana til Umhvørvisstovuna við viðkomandi tilfari í málinum.

Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni í kærumálum kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

**§ 8.** Henda reglugerð, sum samtykt á býráðsfundi tann 28. august 2023 og er góðkend av Umhvørvisstovuni hin 01. november 2023, kemur í gildi 1. januar 2024.

**Vága kommuna**

Bjarni Prior
*borgarstjóri*